# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ein heilsan til Arnu Lognberg á 25 ára starvsdegi hennara

Tann 19. januar 2006 var móttøka á Gerðisgarði í Skálavík. Arna Lognberg úr Skopun hevur arbeitt 25 ár í Heimarøktini.

Tað var fitt av fólki komið saman, har nógv gott varð sagt um Arnu. Eisini segði leiðarin, Ása Davidsen, nøkur vælvald orð.

Arna byrjaði at arbeiða, ella fyrsti starvsdagur hennara var hjá Bellu Drangá í Skopun, síðani hjá Kinne. Arna er, og hevur verið vældámd í sínum arbeiði, og kann ikki sigast annað enn, at tey fólk, sum hon hevur havt við at gera, eru altíð sett í hásæti. Arna er eitt satt arbeiðsgrev, sum tikið verður til.



Tá Sambýlið í Húsavík lat upp, var Arna sett at arbeiða har. Vit hoyra mangan Arnu tosa um tíðina í Húsavík. Har arbeiddi hon frá byrjan og til tað sambýlið lat aftur.

Tá vit so fóru at útbúgva okkum víðari, ja Arna hon helt seg ikki aftur, og fór suður til Tvøroyri at útbúgva seg.

Arna er sera løtt at arbeiða saman við. Skemtilig er hon, men ikki at gloyma, so er hon perfektionist, so hon letur ikki alt um seg ganga.

Arna er gift við Gerhard. Tey vóru ung tá tey blivu gift, hon 18 og hann 19 ár. Tey fingu 3 dreingir, og má sigast, at teir vuksu upp í einum tryggum heimi, og høvdu teir eina góða barlast við heimanífrá. Sofus er giftur við Mariu, tey eiga 3 børn og siglur hann sum skipari. Jóhan Wilhelm eigur eina dóttur og siglir sum stýrimaður og Sámal Hanni er giftur við Kristu, tey eiga 4 børn, og hevur hann handil í Skopun.

Góða Arna, tú skal hava eina stóra tøkk fyri títt ídni á arbeiðsplássinum. Eg fari at ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum.

**Heilsan ein vinur**

## Laila og Sofus heiðrað

**Seinnapartin fríggjadagin vórðu ársins kvinna og maður heiðrað í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Hesi vóru Laila Solmunde og Sofus Olsen, ið vóru vald fyri ávikavist slóðbrótandi arbeiði sum MBF-forkvinna og slóðbrótandi arbeiði fyri bygging av listasavni**

**ÁRSINS KVINNA/ MAÐUR**

*Theodor E. D. Olsen*

Rættiliga fitt av fólki var komið saman í Miðlahúsinum, har Monika Stauss Joensen og Dánjal Eystursetin spældu violin og klaver, og borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni, almanna- og heilsumálaráðharrin, Hans Pauli Strøm og Jan Muller, blaðstjóri, tóku orðið.

Laila Solmunde var sera rørd av at vera vald til ársins kvinnu, men segði lítillátin, at hon ikki átti lut í heiðurinum einsamøll. Hon vónaði, at hetta fór at vera ein eggjan til at stuðla arbeiði fyri fólki við breki.

*Laila Solmunde og Sofus Olsen vórðu heiðrað fyri slóðbrótandi arbeiði teirra – hon sum forkvinna í Meginfelag teirra Brekaðu; hann fyri arbeiðið at fáa sandingum eitt listasavn*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



Sofus Olsen sló í síni takkarroðu fast, at hann hevði ikki latið listasavnið á Sandi byggja, fyri at hann sjálvur skuldi verða heiðraður, men fyri at listaverkini, hann eigur, ikki skulu spjaðast í allar ættir.

Orðið var eisini frítt, og ein, ið tók orðið, var Høgni Mohr, sum m.a. greiddi frá, um ta ferðina Sofus Olsen stýrdi sluppini Isabella í ódnarveðri, og hvussu háskúlastjórin Símum av Skarði hevði eggjað Sofusi at halda fram til víðari lestur.

(Í týsdagsblaðnum verður gjørt meiri burtur úr hesi hendingini)

## Andlát og jarðarferðir

**Sanna Elisa Joensen, ættað úr Vági**, búsitandi á Bústovninum á Eirargarði, andaðist hósdagin 26. januar á Landssjúkrahúsinum, 56 ára gomul. Jarðarferðin varð úr Vágs kirkju, í dag, mánadagin 30. januar kl. 13.00. Tey, sum vilja minnast Sannu, kunnu lata eina peningagávu til Bústovnin í Eirargarði, konta í Føroya Banka.

**Johanna Eivindson Nes, Hvalba** andaðist sunnudagin á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi 88 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Johanna Horn fer til gravar** úr Bethel í Vági, týsdagin 31.januar kl. 1200. Tey, ið vilja minnast Jóhonnu, kunnu lata eina gávu til Malta í Hirshals, Konto í Norðoya Sparikassa

Lítli sonur Ann Mari og Hans Jákup Sivertsen, **Ernst Wesenberg Sivertsen**, andaðist í heiminum fríggjadagin 27. januar, eitt ára gamal. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju týsdagin 31. januar kl. 13:00. Tey, ið ynskja at geva blómur ella kransar, kunnu lata Føroya felag móti Krabbameini ein gávu; konta í peningastovnunum.

**Vilhelmina Hansen, Fuglafirði**, vanliga nevnd Mina, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin, 74 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Elken Petersen, í Klaksvík**, andaðist sunnudagin 29. januar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 83 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum mongu, ið vístu okkum samkenslu, tá ið okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Jens Christian Dam**

andaðist og fór til gravar.

Takk til B6, B7, B8, onkologisku deild og læknarnar Bjarni á Steig og Christoffer Shefer.
Takk til grannar, vinir og familju.
Takk fyri telefonuppringingar, gávur, blómur, kransar og hjálp, eisini tykkum sum hava skrivað so vakurt um hann, takka vit hjartaliga.
Serstøk tøkk til Jógvan Fríðrikson prest,
Alfed Petersen, Sverra Steinhólm prest og
Niels Jacob Neilsen trúboðara fyri troystarík og góð orð í kapellinum, kirkjuni og á grøvini.
Takk til sangarar, dupultkvartettina, kirkjutænaran og Tummas, ið spældi so vakurt.
Takk fyri gávur til Leguhúsið og stóra tøkk til ta stóru mannfjøld, ið fylgdu Jens Christiani til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

Harrin gav, Harrin tók, lova verið navn Harrans.
Hjartans tøkk øll somul.

**Ása, Majken, Petur Eyðun, Martin og Jan Eli**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá kæra móðir, vermóðir, omma og langomma okkara

**Lena Dahl**
Toftir

andaðist og varð jarðað.

Tøkk øll tit, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til Fríðrikskirkjuna.
Og til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Beinta, Torkil og Karin**

**Dagurin í morgin**
**31. januar. Vigilius**, deyður ár 405. Kemur ungur til Trient, har hann í 385 gerst biskupur. Tá ið hann á eini trúboðaraferð kollveltir

✝

Okkara elskaði sonur, beiggi, ommu- og abbasonur

**Ernst Wesenberg Sivertsen**

andaðist í heiminum fríggjadagin 27. januar 2006, 1 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju týsdagin 31. januar kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Ann Mari, Hans, Rani, Andreas og Maria**

*Tey, ið vilja minnast Ernst við blómum ella kransi kunnu lata Føroya Felag ímóti Krabbameini eina gávu, konto í peningastovnunum.*

# Jarðarferð

**Johanna Horn**

fer til gravar úr Bethel í Vági týsdagin 31. januar kl. 12.00.

*Tey, ið vilja sýna samkenslu, kunnu lata eina gávur til »Malta« í Hirtshals, konto í Norðoya Sparikassa.*